

# ÁRSFRÁGREIÐING 2022
## GRANSKING

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# INNIHALDSYVIRLIT


**GRANSKING VÍSIR LEIÐ Í MJØRKA OG MELDRI** .......... 4

GRANSKINGAR- OG FRAMTAKSEINDIN OG KOMMUNUFELAGIÐ Á VITJAN Í NOREGI .......... 5

**GRANSKINGAR- OG FRAMTAKSEINDIN** .......... 6

VITAN, VINNA OG VISJÓN .......... 6

**BYGNAÐUR OG DEILDIR Á SETRINUM** .......... 7

**UM SETRIÐ** .......... 8

UTTANHÝSIS EFTIRMETING AV SETRINUM .......... 6

**DEILDIN FYRI HEILSU- OG SJÚKRARØKTARVÍSINDI** .......... 10

INCREDIBLE IMPACT AWARD 2022 OG ÁRSINS GREIN .......... 11

**FØROYAMÁLSDEILDIN** .......... 11

ORÐFEINGI HJÁ FØROYSKUM BØRNUM .......... 12

**NÁMSVÍSINDADEILDIN** .......... 13

LÆRARAÚTBÚGVINGARRÁÐSTEVNA .......... 14

**NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN** .......... 15

SWAT 2022 .......... 16

**SØGU- OG SAMFELAGSDEILDIN** .......... 16

POLYGOV .......... 17

**AKADEMISK STARVSFÓLK Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA** .......... 18

**VÍSINDALIGAR ÚTGÁVUR** .......... 20

**UMSÓKNIR UM GRANSKINGARSTUÐUL** .......... 22

**PH.D.-LESANDI Á SETRINUM** .......... 23

**PH.D.-LESTUR Á SETRINUM** .......... 25

PH.D.-SKÚLI Á SETRINUM .......... 26

**SAMANUMTØKA** .......... 26

# GRANSKING VÍSIR LEIÐ Í MJØRKA OG MELDRI

Magni Mohr, professari og prorektari fyri gransking á Fróðskaparsetri Føroya.



Ongantíð áður í søgu okkara eru umstøðurnar broyttar so skjótt og so nógv sum nú, og ongantíð áður hava vit skulað leitað eftir loysnum í so stórum kompleksiteti.

Umhvørvið er undir trýsti, trygdarpolitiskur spenningur valdar í Norðuratlantshavi og kríggj er í Evropa, tólmenni loysa alsamt fleiri vanligar uppgávur, vitlíki er knappliga tøkt hjá øllum, stórar og dýrar demografiskar broytingar banka uppá, liviháttarsjúkur breiða seg við fullari ferð, meðan heilsa og trivnaður hjá børnum og ungum eru undir trýsti í talgilda veruleikanum, sum undanfarin ættarlið ikki upplivdu í sínari tíð. Grundleggjandi er tilveran á globalum, samfelagsligum og einstaklinga stigi vorðin meira samansett og fjøltáttað, spitarin er trýstur í botn, og bremsulongdin fyri at rætta kósina er stytt. Tískil er tørvurin at menna varandi, munadyggar og burðardyggar mannagongdir avgerðandi í dagsins og framtíðarinnar verð. Men hava vit veruliga fatað, hvagar vit eru á veg?

Í februar 2022 sat eg saman við øðrum í Norðurlandahúsinum til ein spennandi fyrilestur hjá karismatiska politiska eygleiðaranum, Clement Kjersgaard. Hetta var fáar dagar undan russisku innrásini í Ukraina. Clement hugleiddi um søguligu gongdina í Russlandi eftir fall Sovjetsamveldsins. Hann vísti á, at politikarar í Vesturheiminum vóru vísir í, at tá ið kommunisman fall, fór fólkaræðið at vinna fram í Russlandi. Russland fór at førka seg ímóti Vesturheiminum og at mennast fram ímóti okkara støði. Grundtankin stendst ivaleyst av, at vit meta okkum at liggja á einum hægri menningarstigi enn flest onnur lond og aðrar mentanir, og at tað tí er sjálvsagt og bara ein spurningur um tíð, áðrenn onnur lond, so sum Russland, Kina, Miðeystur ella Norðurkorea, fara at blíva júst sum vit. Hesa hugsan, sum ikki tekur støði í veruligari vitan um hesi samfeløg, kallaði Clement fyri eina 1990-fatan, sum hann metti, at stjórnarleiðarar í Vesturevropa enn hava, hóast søgufrøðin, mentanarfrøðin og fólkalívsfrøðin í dag eru eitt heilt annað stað.

Ein greiður parallellur til tankarnar hjá Clement kann dragast til tær umhvørvisbroytingar, sum eisini hava hótt okkum í áratíggju, og sum granskarar hava roynt at varskógva leiðarar og politikarar um, tó fyri tað mesta til fánýtis. Vit flyta okkum eitt sindur á orkuøkinum, men vit hava ongan veruligan umhvørvispolitikk, sum tekur støði í gransking. Javnvág er ikki ímillum støddina á trupulleikanum og teimum átøkum, sum vit seta á skránna. Um vit fara til trygdarpolitikk, vísir tað seg eisini, at vit ov ofta eru ófyrireikað. Tá tað ræður um heilsupolitikk, er søgan hin sama. Serfrøðin roynir at varskógva, og vísindaligar framrokningar vísa, at um vit ikki fremja radikalar broytingar á fyribyrgjandi økinum, so verður prísurin høgur í komandi tíðum, serstakliga fyri okkara veikastu borgarar. Tá ið vit royna at gera okkurt, er tað ov tilvildarligt, sum oftast uttan granskingargrundaða vitan og uttan at hugsað verður langskygt og burðardygt.

Eisini tá vandatekn síggjast hjá tí mest dýrabara, vit sum tjóð eiga – okkara børnum og ungu – eru vit ov sein at gera nakað. Fyrr í ár skipaði Fróðskaparsetrið fyri ráðstevnu um grundirnar til øktan mistrivnað og ringa heilsu ímillum børn og ung. Niðurstøðan hjá serfrøðini er, at vit mugu gera størri samfelagsligar broytingar og endurhugsa tilgongdina og endamálið við fleiri av okkara barna- og ungdómsstovnum. Gransking innan- og uttanlands hevur víst á hetta í fleiri ár, men tey átøk, sum vit seta í verk, eru ov tepur og ov illa samskipað, og hetta er nakað, sum vit høvdu kunnað gjørt betur, um granskarar og serfrøðingar arbeiddu tættari saman við politiska myndugleikanum og avvarðandi stovnum. Ov ofta vantar okkum eitt heildarperspektiv, og tað er júst hetta, sum serfrøðin og granskingin kann veita. Í hesum døgum er

tilgjørt vit (AI) eisini blivið til eitt arbeiðsamboð, sum krevur, at vit endurskoða okkara skúlaskipanir. Í granskingarhøpi og í vinnulívinum hevur tilgjørt vit verið brúkt í fleiri ár, og serfrøðingar á økinum hava vitað, at hetta fór at koma til okkum øll, eisini okkara børn og ungu, men vit eru ov sein at fyrireika okkum.

Tó eru glottar at hóma. Fróðskaparsetrið, sum er fremsti granskingarstovnur í Føroyum, hevur ment seg nógv seinastu fáu árini. Óhefta uttanhýsis eftirmetingin av Setrinum, sum var gjørd í 2022 vísti, at stovnurin er á veg til at gerast eitt nýmótans universitet. Tá tað ræður um gransking, ganga vit fram á øllum mótum, og Setrið arbeiðir í hesum døgum við at menna eina granskingarstrategi, sum myndugleikarnir vónandi vilja samstarva við okkum um. Eisini eru royndir gjørdar at fáa formaliserað samstarv við aðrar stovnar og við lands- og kommunalar myndugleikar, so at granskingin kann styrkjast og betri umsetast í verki úti í samfelagnum. Vit á Setrinum eiga í størri mun at lata dyrnar upp út í samfelagið, og samfelagið eigur í størri mun at gagnnýta ta serfrøði, sum er í føroyska granskingarumhvørvinum.

Tað gongur framá við føroyskari gransking. Tað vísir menningin seinastu árini og innihaldið í hesari ársfrágreiðing eisini. Tað sæst, at talið og dygdin á vísindaligum greinum og bókum økist, og at føroysk gransking vinnur altjóða heiður. Seinni í ár verður ein ph.d.-skúli settur á stovn á Fróðskaparsetrinum, og eitt universitetssjúkrahús er eisini í umbúna. Samstarv er við nakrar av stóru føroysku vinnufyritøkunum, eitt formaliserað kommunusamstarv er á veg, og ongantíð áður eru so nógvir nýggir ph.d.-arar klaktir á Fróðskaparsetrinum. Men hóast hesi tøk eru tikin, so vantar ein greið ætlan um, hvat politiska skipanin vil við føroyskari gransking. Tað, at upphæddin til Granskingarráðið framvegis er sjey milliónir krónur, har hon hevur ligið seinastu 15 árini, er eitt dømi um, at gransking ikki verður raðfest nóg frammarlaga í Føroyum.

Vit standa á einum vegamóti til ein øðrvísi og umskiftiligan heim. Í bókini “Range” metir rithøvundin David Epstein um, hvørjar førleikar framtíðin krevur av okkum. Hann vísir á tann kompleksitet, sum myndar dagin í dag, og hann metir, at avbjóðingar í dag krevja tvørfakligar loysnir. Framtíðin og framtíðarinnar avbjóðingar fara sambært Epstein at krevja breiðar førleikar, og trupulleikar, sum fyrr kundu loysast av einum stovni ella serfrøðingi, krevja í dag, at bæði stovnar og heilir geirar samstarva tvørtur um mørk. Við framtíðini í huga mugu vit øll royna at arbeiða meira yvirskipað, breitt, burðardygt og granskingargrundað, meðan vit laða teir sterku varðar, sum vísa Føroyum veg inn í framtíðina.

Ársfrágreiðingin fyri gransking í 2022 á Fróðskaparsetrinum veitir eitt yvirlit, sum vísir stóra menning í føroyskari gransking og eina breidd av serfrøði, sum eigur at vera bæði føroyska og altjóða samfelagnum til gagns.

## GRANSKINGAR- OG FRAMTAKSEINDIN OG KOMMUNUFELAGIÐ Á VITJAN Í NOREGI

Granskingar – og framtakseindin og kommunufelagið vóru á formligari vitjan í Trondheim í januar 2023. Endamálið við vitjanini var at fáa innlit í universitetskommunuskipanina í Noregi.

Universitetið í Trondheim samstarvar við Trondheim kommunu og aðrar smærri kommunur í økinum um at loysa trupulleikar og lyfta avbjóðingar, sum kommunurnar hava. Hetta samstarvið snýr seg  um eldraøkið, heilsutænastur, náttúruvernd, ferðavinnu og um at menna snildar og munagóðar tøkniligar loysnir.

Vitjað varð m.a. eisini í Oppdal kommunu fyri at síggja, hvussu ein lítil kommuna gagnnýtir univerisitetssamstarvið. Í Oppdal, har tey hava gjørt “smart-city”-hugtakið til sítt egna og doypt tað um til “smart villages”, sóu vit ítøkilig dømi um, hvussu samstarvið við universitetið í Trondheim hevur ment granskingargrundaðar loysnir á økjum, sum vit kenna aftur sum avbjóðandi fyri føroysku kommunurnar.

Ætlanin er tí nú at menna eina rammuavtalu ímillum Kommunufelagið og Setrið, sum kann tryggja granskingar- og vitanargrundaðar loysnir á økjum, sum føroysku kommunurnar stríðast við.

# GRANSKINGAR- OG FRAMTAKSEINDIN

Granskingar- og framtakseindin varð sett á stovn í 2020. Eindin hevur millum annað til endamáls at styrkja um mannagongdir og førleikar at leiða, stuðla og vegleiða granskarar, serliga teir, ið nýliga eru farnir í gongd. Her arbeiða tvey fólk, umframt eitt verkætlanarstarvsfólk og ein lesandi, sum í styttri tíðarskeið hava loyst ávísar uppgávur. Eisini skal eindin stuðla og vegleiða, tá ið granskarar søkja um fígging til gransking.

Granskingar- og framtakseindin hevur tætt samband og regluligt samskifti við deildirnar á Setrinum gjøgnum granskingarleiðarar, sum eru settir á øllum fimm deildunum og sum virka sum bindilið millum deildirnar og Granskingar- og framtakseindina. Eisini sendir eindin regluliga út dagførd yvirlit yvir opin útboð og annað, har granskarar hava møguleika at søkja um fíggjarligan stuðul til gransking og menning frá grunnum, stovnum og virkjum, bæði innan- og uttanlands.

Kósin er sett, og talið av umsóknum um fíggjarligan stuðul, har starvsfólk á Setrinum eru umsøkjarar, er støðugt vaksandi. Umsóknir verða framvegis sum oftast sendar til grunnar og virkir innanlands, men í 2022 vaks talið av umsóknum til grunnar uttanlands munandi – eitt nú til NordForsk. Hóast økta talið av umsóknum enn ikki sæst aftur í talinum av játtaðum umsóknum í 2022 samanborið við undanfarin ár, er vón fyri framman, og er hetta við til at geva okkara granskarum týðandi royndir og møguleikar til í framtíðini í enn størri mun at leiða altjóða verkætlanir og at søkja um stuðul frá altjóða grunnum sum t.d. Horizon Europe.

Í 2020 vórðu nøkur mál sett fyri granskingina á Setrinum. Ein av raðfestingunum fyri tíðarskeiðið 2020-24 er, at 60 prosent av starvsfólkunum við granskingarskyldu skulu geva út greinar í javnlíkamettum ritum við hægst tveimum ára millumbilum. Harafturat skulu 60 prosent av akademisku starvsfólkunum við hægst tvey ára millumbilum verða við á umsóknum um uttanhýsis fígging av granskingarverkætlanum.

Granskingar- og framtakseindin stuðlar granskarum við at røkka ásettu málunum, og eindin hevur eisini til uppgávu at kunna leiðslu og stýrið Setursins um gongdina ímóti at røkka teimum. Nýggi, altjóða granskingarpallurin – Pure Faroe Islands, sum í 2021 varð settur í verk saman við Landsbókasavninum og Granskingarráðnum, ger arbeiðið at veita dagførd hagtøl um granskingarhópin, útgávur, verkætlanir og tey 17 heimsmálini munandi lættari.

Í 2022 hevur Granskingar- og framtakseindin í samstarvi við ph.d.-ráðið – og netverkið arbeitt miðvíst við at skipa og menna ph.d.-økið á Fróðskaparsetrinum, og 2022 gjørdist árið, har ferð so spakuliga varð sett á arbeiðið at fáa ein ph.d.-skúla settan á stovn á Fróðskaparsetrinum. Á heysti í 2022 varð trivnaðarkanning gjørd av ph.d.-lesandi fyri at staðfesta, hvussu støðan er á økinum, og hvar tørvurin er størstur.

Granskingar- og framtakseindin hevur í 2022 eisini skipað fyri fleiri vælumtóktum og fult teknaðum ph.d.-skeiðum, har bæði ph.d.-lesandi á Setrinum og granskarar frá øðrum granskingarstovnum í Føroyum hava luttikið. Harafturat varð í 2022, í samstarvi við Syddansk Universitet, skipað fyri einum ph.d.-vegleiðaraskeiði fyri øllum professarum, lektarum og adjunktum, ið verða lektaramett innan fyri næsta árið.

Annað endamál, ið Granskingar- og framtakseindin eisini skal stuðla upp undir er at styrkja uttanhýsis sambond, vitanarskifti og nýskapan á Fróðskaparsetrinum. Eindin skipaði tí í 2022 saman við Tórshavnar Kommunu og Hugskotinum fyri einum tiltaki við heitinum "Vitan, vinna og visjón", har ljós varð varpað á, hvussu gransking kann gagna vinnulívi og samfelagi, og hvussu vinnulívið kann gagna granskingini í Føroyum.

## VITAN, VINNA OG VISJÓN

Í mai 2022 var forvitnisligt tiltak í Kongshøll í Havn, har roynd vinnulívsfólk, sum millum annað sjálv hava granskingar- og íverksetararoyndir, høvdu framløgur.

Eisini hoyrdu vit, hvussu tað er at vera granskaraspíri í Føroyum, og um hvussu granskingarumhvørvið í Føroyum kann styrkjast.

Dagurin endaði við orðaskifti um, hvussu gransking í størri mun enn nú kann gagna vinnulívi og samfelagi, og hvussu vinnulívið í størri mun enn nú kann gagna granskingini í Føroyum.

Granskingar- og framtakseindin skipaði fyri tiltakinum saman við Hugskotinum og Tórshavnar Kommunu.




# BYGNAÐUR OG DEILDIR Á SETRINUM

Stýrið er evsti myndugleiki og hevur ábyrgdina av virkseminum mótvegis landsstýrismanninum. Stýrið setur í starv og loysir úr starvi rektara, fyrisitingarstjóra og dekanar.

Um ársskiftið 2022/2023 varð rektaraskifti á Fróðskaparsetrinum, tá ið Martin Tvede Zachariassen tók yvir eftir Chik Collins, ið hevði verið rektari síðan september 2019.

Á Setrinum eru fimm deildir (sí mynd 2), ið bjóða út útbúgvingar og fremja gransking á ymsum økjum so sum í máli og bókmentum; náms- og undirvísingarfrøði; náttúruvísindum, tøkni, støddfrøði; søgu-, samfelags-, búskapar- og løgfrøði; og sjúkrarøktarfrøði og heilsuvísindum. Harafturat er starvsfólkabýtið á teimum fimm deildunum eisini sera ymiskt, sí mynd 3.

MYND 1: **TALIÐ Á AKADEMISKUM STARVSFÓLKUM/ STARVSFÓLKABÓLK Í 2022**




Myndin vísir býtið av akademiskum starvsfólkum millum ymisku starvsfólkabólkarnar á Setrinum í 2022.

# UM SETRIÐ

Í 2022 starvaðust tilsamans 159 akademisk starvsfólk á Setrinum, ið góvu sítt íkast til bæði gransking og undirvísing. Harav vóru 30 adjungeraði og 21 ph.d.-lesandi, sí mynd 1.

Í 2022 høvdu 45 akademisk starvsfólk granskingarskyldu. Hesi eru professarar, lektarar og adjunktar. Adademisku starvsfólkini, ið ikki hava granskingarskyldu, men sum undirvísa á ymisku útbúgvingunum á Setrinum, eru adjungeraði, námslektarar og ph.d.-lesandi.

Samanborið við 2021 er samlaða talið av akademiskum starvsfólkum vaksið við 4 prosentum í 2022.

Í 2022 bjóðaði Fróðskaparsetrið ymiskar útbúgvingar út á bæði bachelor- og masterstigi á teimum fimm deildunum, eins og tað á flestu deildum eisini er møguligt at taka stak-skeið og ph.d.-skeið.

1009 lesandi vóru í 2022 innskrivaði til lestur á Fróðskaparsetur Føroya, harav 21 ph.d.-lesandi.

MYND 2: **BYGNAÐURIN Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA**




## UTTANHÝSIS EFTIRMETING AV SETRINUM

Ein metingarnevnd, mannað av uttanhýsis serfrøðingum, fór í 2021 undir eina umfatandi tilgongd at eftirmeta Setrið sum útbúgvingar- og granskingarstovn. Í oktober 2022 kom metingarnevndin við niðurstøðum og tilmælum, sum – tá tað ræður um gransking og framtak – millum annað fevna um, at Setrið eigur at:

- gera eina inklusiónsætlan, sum fevnir um javnstøðu millum kynini.
- menna og verkseta eitt gjøgnumskygt modell fyri arbeiðsbyrðubýti millum starvsfólk, sum undirvísa og granska á stovninum.
- leggja eina menningarætlan fyri gransking og framtak, sum er í samljóði við missión, strategi og virði Setursins.
- finna fram til, hvussu til ber at menna og stuðla einum ættarliði av granskarum og granskingarhugsandi lærarum, sum fer at skapa vitan og – við tíðini – breiða hana út.
- gera enn meira fyri at fáa sett ein ph.d.-skúla á stovn.

MYND 3: **TALIÐ AV AKADEMISKUM STARVSFÓLKUM BÝTT Á STARVSFÓLKABÓLKAR Á TEIMUM FIMM DEILDUNUM Í 2022**




Myndin vísir býtið av akademiskum starvsfólkum millum ymisku starvsfólkabólkarnar á Setrinum í 2022.



# DEILDIN FYRI HEILSU- OG SJÚKRARØKTARVÍSINDI

Maria Skaalum Petersen, ph.d. og lektari í heilsuvísindum, er granskingarleiðari
á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi (DHS)



Útbúgving og gransking á Setrinum skal vera til vaksandi gagns fyri føroyska samfelagið, okkara nærmastu grannar og allan heimin. Soleiðis stendur í strategiætlan okkara, Mál og Mið 2020 – 2024, og hetta virkar DHS fyri.

Eins og áður leggur leiðslan á DHS stóran dent á gransking, og áherðsla er løgd á týdningin av dygdargóðari undirvísing, men sanniliga eisini á gransking á høgum altjóða stigi.

Nógv gransking gongur fyri seg á DHS. Granskingarøkið fevnir um heilsuvísindi í breiðastu merking, og evnini, sum granskað verður í, eru rættiliga ymisk og víðfevnd. Eitt nú verður granskað í sjúkrarøkt, arbeiðs- og ítrottarfysiologi, epidemiologi, sosialum ójavna, eldri fólki, neurodegenerativum sjúkum, diabetes, sálarheilsu, matvanum og palliatión. Hetta sæst aftur í talinum av vísindaligum útgávum, sum í 2022 var 59.  Hetta eru vit á DHS rættiliga errin av, tí tað er bert ein brøkpartur av starvshópinum, sum hevur granskingartíð. Ein ph.d.-verja hevur verið í 2022, og ein nýggjur ph.d.-lesandi er innskrivaður á DHS í 2022. Deildin samstarvar um gransking við nógvar ymiskar stovnar í Føroyum, men deildin hevur eisini sterk granskingarsamstørv úti í heimi.

DHS arbeiðir miðvíst ímóti at økja og breiðka um granskingarvirksemið og at fáa betri granskingarsamstørv, fyrst og fremst við sjúkrahúsverkið, men eisini við aðrar føroyskar stovnar, umframt at styrkja granskingar-samstarvið út í heim enn meira.

### GRANSKING Á DEILDINA FYRI HEILSU- OG SJÚKRARØKTARVÍSINDI

Í 2022 góvu starvsfólk á DHS út 59 granskingarúrtøk, harav 52 vóru javnlíkamettar útgávur.

Í 2022 hava starvsfólk á DHS í 99 førum verið nevndir rithøvundar á vísindaligum tilfari, harav tað í 87 førum var sum rithøvundur á javnlíkamettum útgávum.

Í løtuni eru 47 ymiskar granskingarverkætlanir í gongd við tilknýti til DHS, har samstarvað verður við millum annað Landssjúkrahúsið, Landslæknastovnin, Apoteksverkið, Syddansk Universitet, Københavns Universitet og University of Florida.

Í 2022 vóru sjey ph.d.-verkætlanir í gongd, ið hava tilknýti til DHS og granskarar á deildini.

### UM DEILDINA FYRI HEILSU- OG SJÚKRARØKTARVÍSINDI

Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi (DHS) heldur til í Sjóvinnuhúsinum á Vestaru Bryggju í Havn.

Í 2022 hava 38 akademisk starvsfólk starvast á deildini, harav sjey hava granskingarskyldu. Magni Mohr, ph.d. og professari í arbeiðs- og ítróttarfysiologi, er dekanur, og May-Britt Skoradal, ph.d. og adjunktur, er vara-dekanur. Á DHS er Maria Skaalum Petersen, ph.d. og lektari í heilsuvísindum, deildargranskingarleiðari.

DHS bjóðar út eina bachelor- og eina masterútbúgving. Eisini skipar deildin fyri serstøkum skeiðum á bachelor-, master og ph.d.-stigi, og til ber at taka bæði ískoytis- og stakskeið á DHS.

Í 2022 vóru 205 lesandi innskrivað til lestur á DHS.

## INCREDIBLE IMPACT AWARD 2022 OG ÁRSINS GREIN

Ráðstevnan “Football is Medicine 2020”, sum Magni Mohr, professari, og May-Britt Skoradal, adjunktur, skipaðu fyri í januar 2020, fekk altjóða heiðurslønina Incredible Impact Award 2022 frá Best Cities Global Alliance og International Congress and Convention Association. Við virðislønini fylgdu 7.500 dollarar, og hendan peningagávan verður markað til gransking.

Greinin “The Role of Muscle Glycogen Content and Localization in High-Intensity Exercise Performance: A Placebo-Controlled Trial” við Magna Mohr, professara, sum høvuðsrithøvund, varð av American College of Sports Medicine (ACSM) kosin ársins grein í 2022 í tíðarritinum ‘Medicine and Science in Sport and Exercise’.

# FØROYAMÁLSDEILDIN

Hjalmar P. Petersen, professari í málvísindum, er granskingarleiðari á Føroyamálsdeildini (FMD)



Gransking á Føroyamálsdeildini er í ymiskum evnum í bókmentum, máli og list. Afturat hesum verður farið undir máltøkni í 2023, har eitt fólk verður sett í starv.

Á FMD er undirvísing í skylduskeiðum í máli og bókmentum á grundstigi (m.a. málsøga, ljóð- og formlæra, bókmentasøga), og ymisk evni verða tikin fram á framhaldinum, sum millum annað er málbroyting og -variatión, málføri, týðingarfrøði og ástøði í tvørvísindaligum arbeiði við vistgreining í nútíðarføroyskum skaldskapi.

Málgranskingin á Føroyamálsdeildini fevnir um nútíðarføroyska ljóð- og formskipan og nútíðarføroyska syntaks. Arbeitt verður við málamóti, og danska og enska ávirkanin á føroyskt verður kannað. Hugt verður eisini at hugburði til málføri og purismu, og spurt verður, um málførini fara at hvørva?

Lesivanar og orðfeingi hjá børnum umframt máltøka er granskingarevni, sum er nýtt á deildini. Her verður í løtuni hugt nærri at serliga teirri ljóðskipan, ið børn hava, og hvussu hon útviklar seg við tíðini.

Arbeitt verður við eini Føroyskari málsøgu, sum skal koma út í 2024. Málsøgan verður tvey bind, har umrødd eru evni sum syntaktiskar broytingar, skriftmálssøgan, fakmál, málføri og eitt nú mál og tjóðarbygging.

Í bókmentum verður granskað bæði í bókmentasøgu og í bókmentaligum evnum. Arbeitt verður við einari føroyskari bókmentasøgu, sum higartil er komin í tveimum bindum.

Millum bókmentaligu evnini, sum granskað verður í, er serliga at nevna kyn og bókmentir, vistgreining, t.e. umhvørvisspurningar og bókmentir, umframt komparativar kanningar av modernistiskum yrkingum í Norðurlondum. Bókmentasøguligar viðgerðir av ferðafrásagnum úr Norðuratlanshavi og Arktis er eitt nýtt granskingarevni, og tað sama eru granskingarverkætlanir um føroysku kvæðini í europeiskum høpi og gransking í norðurlendskum miðaldarhandritum.

Granskararnir á Føroyamálsdeildini eru knýttir at verkætlanum og netverkum, sum binda granskingina á deildini í aðra gransking í Europa og USA.

Í mun til granskingina í máli og bókmentum er granskingin í list í breiðastu merking rættiliga nýggj á Føroyamálsdeildini.

Granskað verður serliga í fagurfrøði við støði í heimspeki og ástøðiligum spurningum í myndlist.

Ætlandi verður eitt hálvtíðar, tíðaravmarkað starv sum orðabókaritstjóri sett í ár. Afturat tí er norðurlendskur peningur játtaður til at gera ein føroyskan tekstabanka.

## UM FØROYAMÁLSDEILDINA

Á Debesartrøð í Havn heldur Føroyamálsdeildin (FMD) til.

Tilsamans hava 13 akademisk starvsfólk starvast á deildini í 2022, harav seks hava granskingarskyldu. Bergur Djurhuus Hansen, ph.d. og lektari í bókmentum, er dekanur á deildini, og Zakaris Svabo Hansen, námslektari í føroyskum, er vara-dekanur. Hjalmar P. Petersen, Dr.phil. og professari í málvísindum, er deildargranskingarleiðari á FMD.

FMD bjóðar út tvær bachelorútbúgvingar, eina masterútbúgving, hjánám í føroyskum, umframt stak- og summarskeið. Eisini bjóðar FMD út diplomútbúgving í føroyskum sum annaðmál.

Í 2022 vóru 82 lesandi innskrivað til lestur á FMD.

## GRANSKING Á FØROYAMÁLSDEILDINI

Í 2022 góvu starvsfólk á FMD út 30 granskingarúrtøk, harav 19 vóru javnlíkamettar útgávur.

Í 2022 hava starvsfólk á FMD í 37 førum verið nevndir rithøvundar á vísindaligum tilfari, harav tað í 22 førum var sum rithøvundur á javnlíkamettum útgávum.

Í løtuni eru 11 ymiskar granskingarverkætlanir í gongd, har samstarvað verður við millum annað granskarar á universitetum í Norðurlondum, Europa og aðrastaðni.

Í 2022 vóru tvær ph.d.-verkætlanir í gongd, ið hava tilknýti til FMD og granskarar á deildini.

## ORÐFEINGI HJÁ FØROYSKUM BØRNUM

Eitt nýtt granskingarøki á FMD er gransking í orðfeingi og máltøku hjá føroyskum børnum. Tað er Sissal M. Rasmussen, ph.d. og adjunktur, ið granskar á hesum økinum.

Sissal hevur kannað orðfeingið hjá 415 føroyskum børnum í aldrinum átta til 20 mánaðar. Í mai 2022 gav hon út eina vísindaliga grein "Faroese children´s first words" í tíðarritinum Nordic Journal of Linguistics.

Niðurstøðan er, at máltøkan hjá føroyskum børnum líkist henni hjá børnum aðrastaðni, men at føroysk børn hava eitt nakað størri orðfeingi, tá ið ræður um orð, ið snúgva seg um familjusambond.

# NÁMSVÍSINDADEILDIN

Ingi H. Heinesen, ph.d. og adjunktur í støddfrøðilæringarfrøði, er virkandi granskingarleiðari á Námsvísindadeildini (NÁD)



Á Námsvísindadeildini økist granskingarvirksemið støðugt. Aftur í 2022 var úrtøkan fleiri javnlíkamettar útgávur enn árið frammanundan. Útgávurnar fevna um gransking á fleiri námsvísindaligum økjum; frá dagstovni, fólkaskúla og upp til setursnámsfrøði. Millum víðfevnandi granskingarevnini kunnu nevnast greiningar av fyrstu orðunum hjá føroyskum børnum á dagstovni; støddfrøði-undirvísing í forskúlunum; avbjóðingum hjá lærarum í fólkaskúlanum undir COVID-19 farsóttini og nýtslu av tøkni í fólkaskúlanum.

Í starvsfólkahópinum økjast granskingarførleikarnir eisini støðugt, og í 2022 bleiv ein adjunktur lektaramettur, umframt at ein ph.d.-lesandi varð knýttur at NÁD, ið, sum tann fyrsti á deildini, fer at granska í tónleikaundirvísing.

Á NÁD er okkara greiða visjón, at granskingarvirksemið skal vaksa. Ætlanin er miðvíst at økja um granskingarførleikarnar á deildini, og ikki minst at vaksa um talið á javnlíkamettum útgávum. Eisini fara vit at seta í verk til tess at styrkja um miðlingina av okkara gransking til føroyska samfelagið, so at almenningurin í størri mun gerst varugur við ta gransking, sum verður framd á NÁD.

### UM NÁMSVÍSINDADEILDINA

Námsvísindadeildin (NÁD) heldur til á Frælsinum í Havn.

Í 2022 hava tilsamans 32 akademisk starvsfólk starvast á NÁD, harav fýra hava granskingarskyldu. Erla Olsen, ph.d. og lektari í lívfrøði, er dekanur á deildini. Hans Harryson, ph.d. og námslektari í undirvísing og læring, og Annika Anthoniussen, námslektari í námsfrøðiligari sosiologi, eru vara-dekanar á deildini. Ingi Heinesen Højsted, ph.d. og adjunktur í støddfrøði, er deildargranskingarleiðari á NÁD.

NÁD bjóðar út tvær bachelorútbúgvingar, umframt eftir- og ískoytisútbúgvingar og ph.d.- og stakskeið.

Í 2022 vóru 328 lesandi innskrivað til lestur á deildini.

### GRANSKING Á NÁMSVÍSINDADEILDINI

Í 2022 góvu starvsfólk á NÁD út 15 granskingarúrtøk, harav 6 vóru javnlíkamettar útgávur.

Í 2022 hava starvsfólk á NÁD í 19 førum verið rithøvundar á vísindaligum tilfari, harav tað í seks førum var sum rithøvundur á javnlíkamettum útgávum.

Í løtuni eru 21 ymiskar granskingarverkætlanir í gongd, har samstarvað verður við millum annað Tórshavnar Kommunu, UArtic-netverk og universitet í Norðurlondum og Europa.

Tvær ph.d.-verkætlanir vóru í gongd í 2022, ið hava tilknýti til NÁD og granskarar á deildini.

## LÆRARAÚTBÚGVINGARRÁÐSTEVNA

3. - 5. mai 2022 var NÁD vertur fyri 16. Norðurlendsku læraraútbúgvingarráðstevnuna. Ráðstevnan eydnaðist framúr væl, og heilar 101 framløgur vóru hildnar um námsvísindaliga gransking hesar dagarnar.

Teir umleið 250 luttakararnir, ið taldu granskarar og undirvísarar á norðurlendskum læraraútbúgvingum, komu úr Noregi, Svøríki, Danmark, Finlandi, Íslandi, Grønlandi umframt úr Føroyum.

Høvuðsendamálið við afturvendandi ráðstevnuni er at styrkja norðurlendskt samstarv og sínámillum vitanarbýti við støði í gransking, royndum og praksis á økjum, sum eru viðkomandi fyri læraraútbúgvingar. Høvuðsevnið á ráðstevnuni í 2022 var “Innovatión í undirvísing og læring”, og høvuðsfyrilestrarnir snúðu seg í stóran mun um talgilda undirvísing og tilgjørt vit og tess fyrimunir og vansar í undirvísingarhøpi.



# NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN

Qin Xin, professari í teldufrøði, er granskingarleiðari á Náttúruvísindadeildini (NVD) í 2022



Menning í modernaða samfelagnum er í stóran mun knýtt at gransking í náttúruvísindum og tøkni, og á NVD verður gransking í teldufrøði við serligum denti á tilgjørdum viti, alnót/5G og net-trygd raðfest. Hetta verður m.a. gjørt til tess at møta risastóru krøvunum um vælútbúnar teldufrøðingar í Føroyum. Fyri at lúka hesi krøv, hava vit sett fleiri nýggj vísindastarvsfólk í teldufrøði í 2022.

Sum partur av strategisku menningarætlanini hjá Fróðskaparsetri Føroya miðar NVD eftir at menna serstøk fakøki so sum algoritmur og støddfrøði, tilgjørt vit, bio-hagfrøði, biokunningarfrøði, dátutrygd, teldufrøði, orkuverkfrøði, mýlalívsvísindi og havfrøði.

Granskingin á NVD er býtt upp í tríggjar granskingar– og útbúgvingardeildir: lívfrøði, verkfrøði og teldufrøði umframt ein granskingardepil: Depilin fyri staðsetingarfrøði, "Geospatial Centre of the Faroe Islands".

## GRANSKING Á NÁTTÚRUVÍSINDADEILDINI

Í 2022 góvu starvsfólk á NVD út 69 granskingarúrtøk, harav 34 vóru javnlíkamettar útgávur.

Í 2022 hava starvsfólk á NVD í 110 førum verið rithøvundar á vísindaligum tilfari, harav tað í 54 førum var sum rithøvundur á javnlíkamettum útgávum.

Í løtuni eru 35 ymiskar granskingarverkætlanir í gongd, har samstarvað verður við millum annað Fiskaaling, Havstovuna, Bakkafrost og universitet í Norðurlondum.

Fimm ph.d.-verkætlanir vóru í gongd í 2022, ið hava tilknýti til NVD og granskarar á deildini.

## UM NÁTTÚRUVÍSINDADEILDINA

Náttúruvísindadeildin (NVD) heldur til í Sjóvinnuhúsinum á Vestaru bryggju í Havn.

Tilsamans hava 37 akademisk starvsfólk starvast á NVD í 2022 – 12 av teimum hava granskingarskyldu. Hans Pauli Joensen, lektari í alisfrøði, er dekanur á deildini, og Qin Xin, professari í teldufrøði, hevur verið deildargranskingarleiðari á NVD.

NVD bjóðar úr fimm bachelorútbúgvingar, eina masterútbúgving umframt hjánám í støddfrøði og diplom í web-menning.

Í 2022 vóru 151 lesandi innskrivað til lestur á NVD.

Okkara fremsta gransking gevur íblástur til nýhugsandi og tvørfaklig samstørv við eini rúgvu av ymiskum samstarvspørtum og serfrøðingum í ídnaðarvinnuni, privatu vinnuni og almenna geiranum.

Granskingin á NVD er útgivin í mongum altjóða tíðarritum, og seniorgranskararnir á deildini luttaka regluliga á leiðandi ráðstevnum um tøknifrøði, teldufrøði og ravmagnsfrøði.

Alsamt vaksandi eftirspurningur frá vinnuni og tilvit frá ymiskum grunnum hevur økt um eksternu fíggingina til deildina, m.a. til ph.d.-verkætlanir. NVD fekk í 2022 fígging til tríggjar nýggjar verkætlanir frá Granskingargrunninum, umframt fígging til níggju vísindalig størv í teldufrøði frá politisku myndugleikunum.

### SWAT 2022

Til tess at gerast sjónligari í altjóða høpi og at styrkja sítt granskingarumdømi skipaði NVD fyri 18. skandinavisku ráðstevnuni um Algoritmu-ástøði ("Scandinavian Symposium and Workshops on Algorithm Theory") í Havn frá 27. til 29. juni 2022.

SWAT er eitt forum fyri granskarar, ið fáast við sniðgeving og greining í sambandi við algoritmur og telduuppbygging/teldustrukturar. Ráðstevnan er eitt afturvendandi tiltak og hevur verið hildin annaðhvørt ár í ymisku Norðurlondunum síðani 1988. Hetta var fyrstu ferð, at ráðstevnan varð hildin í Føroyum.

# SØGU- OG SAMFELAGSDEILDIN

Firouz Gaini, professari í antropologi, er granskingarleiðari á Søgu- og samfelagsdeildini (SSD)



Á Søgu – og samfelagsdeildini hevur nógv granskingarvirksemi verið í 2022, og nógvar stórar og týðandi granskingarverkætlanir eru knýttar at SSD. Ímillum hesar er eitt nú ein nýggj norðurlendsk/arktisk verkætlan, kallað "PolyGov",  ið kannar politisku handfaringina av koronukreppuni.

Søgu – og samfelagsdeildin er miðdepil fyri føroyska gransking í søgu– og  samfelagsvísindum í breiðastu merking. Fakøkini, ið granskað og undirvíst verður í, eru m.a. antropologi, løgfrøði, stjórnmálafrøði, búskaparfrøði, fiskivinnubúskapi og gudfrøði, umframt samfelagsfrøði og søgufrøði.

SSD-granskarar luttaka í nógvum norðurlendskum og altjóða granskingarnetverkum, sum umfata bæði ítøkiligar granskingarverkætlanir og meira yvirskipaði samstørv.

Ímillum mongu og áhugaverdu átøkini, ið vórðu framd í 2022, kann nevnast, at eitt skeið í lóg (SACS) varð hildið í Abuja í Tanzania í apríl (við einum umboði frá SSD sum ein av fyriskiparunum), og at ein ráðstevna um pápar og familjulív varð hildin í Kongshøll í mars mánaða.

SSD-granskarar hildu í 2022 eina ørgrynnu av fyrilestrum, bæði í Føroyum og á altjóða ráðstevnum. Eisini vóru bæði fakbøkur og ein røð av vísindaligum greinum um evni so sum oyggjasamfeløg, religión, talufrælsi & haturstalu og grundlógatulking givnar út í altjóða viðurkendum tíðarritum. SSD-granskarar eru eisini javnan at hoyra í miðlunum, har tey, við støði í sínum serkunnleika, geva eitt týdningarmikið íkast til orðaskiftið um eitt nú politisku støðuna í Føroyum.

SSD hevur í 2022 skipað fyri sokallaðum "Fróðskaparflísum"

("brown bag talks"), har granskarar á deildini í døgurðatímanum hava hildið fyrilestrar fyri almenninginum um eitthvørt evni, og møguleiki hevur verið fyri at seta granskarunum spurningar aftaná.

Ein hornasteinur í granskingini á Søgu – og samfelags-deildini er at lýsa føroyska nútíðarsamfelagið og at seta tað í samband við fortíðina umframt at seta tað í samband við grannalond og altjóða samfelagið. Í løtuni verður granskað í veljaraatferð, pápaleiklutinum, javnstøðu, umhvørvisligari burðardygd, koronutíðini og mongum øðrum evnum.
At enda kann nevnast, at ein stór hending á SSD í 2022 var, at løgfrøðiútbúgvingin varð javnsett við løgfrøðiútbúgvingarnar á donskum universitetum.
Hetta hendi eftir drúgvar samráðingar millum føroyskar og danskar myndugleikar og merkir, at løgfrøðingar, ið eru útbúnir á Fróðskaparsetrinum, nú kunnu virka sum dómarar, ákærar og advokatar á jøvnum føti við løgfrøðingar, ið eru útbúnir á donskum universitetum.

### UM SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINA

Søgu- og samfelagsdeildin (SSD) húsast í Jónas Broncks gøtu í Havn.

Í 2022 hava tilsamans 39 akademisk starvsfólk starvast á SSD, harav 16 hava granskingarskyldu. Hans Andrias Sølvará, ph.d. og professari í søgu, er dekanur á deildini. Erika Hayfield, ph.d. og lektari í samfelagsvísindum, og Hans Ellefsen, ph.d. og adjunktur í búskaparfrøði, eru vara-dekanar á deildini. Firouz Gaini, ph.d. og professari í antropologi, er deildargranskingaleiðari í SSD.

Deildin bjóðar út fimm bachelorútbúgvingar og fimm masterútbúgvingar, umframt hjánám í søgu og samfelagsvísindum. Harafturat ber til at taka stak- og ph.d.-skeið á SSD.

Í 2022 vóru 243 lesandi innskrivað til lestur á SSD.

### GRANSKING Á SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINI

Í 2022 góvu starvsfólk á SSD út 103 granskingarúrtøk, harav 31 vóru javnlíkamettar útgávur.

Í 2022 hava starvsfólk á SSD í 111 førum verið rithøvundar á vísindaligum tilfari, harav tað í 38 førum var sum rithøvundur á javnlíkamettum útgávum.

Í løtuni eru 24 ymiskar granskingarverkætlanir í gongd, har samstarvað verður við millum annað universitet og stovnar í Norðurlondum og altjóða granskingarnetverk.

Fimm ph.d.-verkætlanir vóru í gongd í 2022, ið høvdu tilknýti til SSD og granskarar á deildini.

## POLYGOV

PolyGov er stór norðurlendsk verkætlan, sum byggir á komparativar kanningar millum Ísland, Svøríki, Finland, Norra, Danmark og Føroyar.

Høvuðsendamálið við verkætlanini er at staðfesta og skjalprógva munirnar í handfaringini av koronukreppuni í londunum, umframt at staðfesta, hvørjar avleiðingarnar av ymisku handfaringarhættunum hava verið – og hvussu hetta vísir seg í samfelagnum.

Tað eru Jens Christian Svabo Justinussen, ph.d. og lektari í samfelagsvísindum, og Rógvi Olavson, ph.d.-lesandi í politikki og almennari umsiting, ið standa fyri verkætlanini í Føroyum.

# AKADEMISK STARVSFÓLK Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA Í 2022

Høvuðsuppgávan hjá Fróðskaparsetri Føroya er at undirvísa og granska, og akademisk starvsfólk eru tey, ið eru beinleiðis sett til at røkja hesar uppgávur. Granskarar á Setrinum eru tey, ið bæði granska og undirvísa, og granskarahópurin, ið fevnir um professarar, lektarar og adjunktar, telur beint undir ein triðing (28 prosent) av samlaða akademiska starvsfólkatalinum.

Granskarar hava - øvugt hinum báðum triðingunum av akademiskum starvsfólkum, ið eru dekanar, adjungerað, námslektarar og ph.d.-lesandi - granskingarskyldu. Tískil eru tað eisini granskarar, ið skulu tryggja, at Setrið røkkur ásetingum um gransking og vísindaligar útgávur.

Mynd 4 vísir samlaðu tølini fyri akademisk starvsfólk á Setrinum við og uttan granskingarskyldu í 2022 samanborið við 2020 og 2021, meðan mynd 5 vísir talið av akademiskum starvsfólkum við og uttan granskingarskyldu á teimum fimm deildunum í 2022.

Í 2022 vóru tilsamans 159 akademisk starvsfólk knýtt at Fróðskaparsetrinum, harav 45 hava granskingarskyldu. Talið av akademiskum starvsfólkum er vaksið eitt vet (fýra prosent) frá 2021 til 2022, meðan talið av starvsfólkum við granskingarskyldu í mun til samlaða talið av akademiskum starvsfólkum er fallið úr 37 prosentum í 2020 niður í 32 prosent í 2021 og 28 prosent í 2022.

MYND 4: **TALIÐ AV AKADEMISKUM STARVSFÓLKUM/ÁR**




Myndin vísir talið av akademiskum starvsfólkum á Setrinum í 2020, 2021 og 2022. Meðan gráu stabbarnir vísa samlaða talið av akademiskum starvsfólkum, vísa bláu og appelsinlittu stabbarnir talið av ávíkavist starvsfólkum við og uttan granskingarskyldu.

Um hugt verður nærri at talinum av akademiskum starvsfólkum í 2022 sæst, at DHS, NÁD, NVD og SSD hava oman fyri 30 akademisk starvsfólk, meðan talið er nakað lægri á FMD – 13 akademisk starvsfólk. Hinvegin vísa tølini eisini, at lutfallið av starvsfólkum við granskingarskyldu er

MYND 5: **TALIÐ AV AKADEMISKUM STARVSFÓLKUM BÝTT EFTIR GRANSKINGARSKYLDU**




Myndin vísir talið av akademiskum starvsfólkum (gráir stabbar) á teimum fimm deildunum á Setrinum í 2022, umframt talið av akademiskum starvsfólkum við (bláir stabbar) og uttan granskingarskyldu (appelsinlittir stabbar).

MYND 6: **KYNSBÝTIÐ MILLUM AKADEMISK STARVSFÓLK**




Myndin vísir kynsbýtið millum talið av akademiskum starvsfólkum á Setrinum í 2020, 2021 og 2022. Meðan gráu stabbarnir vísa samlaða talið av akademiskum starvsfólkum, vísa bláu og appelsinlittu stabbarnir talið av ávikavist kvinnum og monnum.

MYND 7: **KYNSBÝTIÐ MILLUM AKADEMISK STARVSFÓLK VIÐ OG UTTAN GRANSKINGARSKYLDU**




Myndin vísir kynsbýtið millum talið av kvinnum (bláir stabbar) og monnum (appelsinlittir stabbar) millum starvsfólk við og uttan granskingarskyldu.

hægst á FMD (46 prosent), meðan DHS og NÁD lutfalsliga hava fægst starvsfólk við granskingarskyldu, ávikavist 18 og 13 prosent.

Av teimum 159 akademisku starvsfólkunum, sum starvaðust á Fróðskaparsetrinum í 2022, vóru 76 kvinnur og 83 menn, svarandi til ávikavist 48 og 52 prosent av samlaða akademiska starvsfólkahópinum, sí mynd 6. Støðan í 2022 á javnstøðuøkinum er sostatt eitt vet frægari samanborið við 2020 og 2021.

Mynd 8 vísir kynsbýtið á teimum fimm deildunum á Setrinum. Eins og undanfarin ár eru í 2022 flest kvinnur í akademisku størvunum á DHS og NÁD, og í miðal starvast 67 prosent kvinnur á DHS, FMD og NÁD. Støðan á NVD og SSD er tann beint øvugta, tí har starvast nevniliga í miðal 25 prosent kvinnur og 75 prosent menn.

Harafturat vísa tølini yvir kynsbýtið millum akademisk starvsfólk í 2022, sí mynd 7, at út av teimum 45 starvsfólkunum við granskingarskyldu eru 38 prosent kvinnur, meðan kynsbýtið millum starvsfólk uttan granskingarskyldu er nakað javnari - ávíkavist 52 prosent kvinnur og 48 prosent menn.

MYND 8: **KYNSBÝTIÐ MILLUM TALIÐ AV AKADEMISKUM STARVSFÓLKUM BÝTT Á DEILDIR**




Myndin vísir kynsbýtið millum talið av akademiskum starvsfólkum á teimum fimm deildunum á Setrinum í 2022. Bláu, appelsinlittu og gráu stabbarnir vísa ávíkavist talið av kvinnum, monnum og samlaða talið á teimum fimm deildunum.

# VÍSINDALIGAR ÚTGÁVUR Í 2022

Starvsfólk á Fróðskaparsetri Føroya framleiða gransking á høgum altjóða stigi, og Fróðskaparsetrið skal tryggja, at granskingin er nærløgd, haldfør, væl miðlað og atkomulig fyri ikki-akademiska móttakaran og almenninginum sum heild.

Í 2022 komu 276 vísindaligar útgávur út, har eitt ella fleiri starvsfólk á Setrinum eru umboðað, harav 142 javnlíkamettar útgávur. Samanborið við 2021 er talan um eina øking upp á 48 og 35 prosent av ávikavist vísindaligum og javnlíkamettum útgávum.

Tølini fyri vísindaligar útgávur í 2022 vísa eisini, at tað á øllum fimm deildunum á Setrinum sæst ein ávís framgongd í talinum av javnlíkamettum útgávum og í samlaða talinum av vísindaligum útgávum, sí mynd 11. Harafturat vísa tølini, at DHS nærum einans gevur út javnlíkamettar útgávur, meðan hinar fýra deildirnar og kanska serliga SSD eisini geva út aðrar vísindaligar útgávur.

Stóra framgongdin vísir fyrst av øllum ein virknan granskingarhóp á Fróðskaparsetrinum, men framgongdin kann í ávísan mun eisini vera ávirkað av, at tað í Pure Faroe Islands nú er munandi lættari hjá granskarum at skráseta sínar útgávur og annað granskingarvirksemi.

Í 2022 hava starvsfólk á Setrinum í 376 førum verið nevnd sum høvundar á vísindaligum útgávum, harav tað í 207 førum var sum rithøvundur á útgávum í altjóða viðurkendum og javnlíkamettum tíðarritum – ein vøkstur upp á ávikavist 46 og 24 prosent samanborið við 2021, sí mynd 9.

Mynd 10 vísir hvussu ofta starvsfólk á teimum fimm deildunum hava verið nevnd sum rithøvundar á

MYND 9: **TALIÐ AV FERÐUM, HAR STARVSFÓLK ERU NEVND SUM HØVUNDAR Á VÍSINDALIGUM ÚTGÁVUM/ÁR**




Myndin vísir talið av ferðum, har starvsfólk á Setrinum hava verið nevnd sum rithøvundar á vísindaligum tilfari í 2020, 2021 og 2022. Bláu stabbarnir vísa talið av ferðum, har starvsfólk hava verið nevnd sum rithøvundar á javnlíkamettum útgávum, meðan appelsinlittu stabbarnir vísa samlaða talið av ferðum, har starvsfólk hava verið nevnd sum rithøvundar á vísindaligum útgávum.

MYND 10: **TALIÐ AV FERÐUM, HAR STARVSFÓLK ERU NEVND SUM HØVUNDAR Á VÍSINDALIGUM ÚTGÁVUM Í 2022 BÝTT Á DEILDIR**




Myndin vísir talið av ferðum, har starvsfólk á teimum fimm deildunum á Setrinum hava verið nevnd sum rithøvundar á vísindaligum tilfari í 2022. Bláu stabbarnir vísa talið av ferðum, har starvsfólk hava verið nevnd sum rithøvundar á javnlíkamettum útgávum, meðan appelsinlittu stabbarnir vísa samlaða talið av ferðum, har starvsfólk hava verið nevnd sum rithøvundar á vísindaligum útgávum.

MYND 11: **TALIÐ AV VÍSINDALIGUM ÚTGÁVUM/DEILD Í 2022**




Myndin vísir talið av vísindaligum útgávum á teimum fimm deildunum á Setrinum í 2022. Bláu stabbarnir vísa talið av javnlíkamettum útgávum, meðan appelsinlittu stababrnir vísa samlaða talið av vísindaligum útgávum.

vísindaligum tilfari og javnlíkamettum útgávum í 2022. Eins og undanfarin ár vísa tølini, at tað er í heilsu- og náttúrvísindum, at starvsfólk oftast eru nevnd sum rithøvundar á javnlíkamettum útgávum, og hetta endurspeglar eisini ymisku útgávusiðirnar á ymisku fakøkjunum. Størsta framgongdin, har starvsfólk eru nevnd sum rithøvundar á javnlíkamettum útgávum, sæst á FMD, har starvsfólk 22 ferðir vórðu nevnd sum rithøvundar á javnlíkamettum útgávum í 2022 samanborið við fimm ferðir árið fyri.

Í 2020 setti Setrið sær sum mál, at 60 prosent av akademisku starvsfólkunum skulu geva greinar út í javnlíkamettum ritum við í mesta lagi tveimum ára millumbilum. Tølini fyri 2022 vísa, at Setrið røkkur hesum málinum, tí 82 prosent av akademisku starvsfólkunum við granskingartíð geva út greinar í javnlíkamettum ritum. Tó er støðan eitt sindur ymisk millum deildirnar, og mynd 12 vísir, at fýra av fimm deildum á Setrinum røkka ásetta málinum. Á DHS og FMD hava øll starvsfólk við granskingarskyldu givið út javnlíkamettar greinar í 2021 og/ella 2022, á NVD og SSD er talið ávikavist 75 og 81 prosent, meðan helmingurin av starvsfólkunum við granskingarskyldu á NÁD hava givið javnlíkamett tilfar út.

MYND 12: **STARVSFÓLK VIÐ GRANSKINGARSKYLDU, IÐ ÚTGEVA GREINAR Í JAVNLÍKAMETTUM RITUM Í 2021 OG/ELLA 2022V**




Myndin vísir prosent-partin av akademiskum starvsfólkum við granskingarskyldum á teimum fimm deildunum á Setrinum, ið geva út greinar í javnlíkamettum ritum við tvey ára millumbili (bláu stabbarnir). Reyða linjan vísir málið hjá Setrinum, ið er, at 60% av akademisku starvsfólkunum útgeva greinar í javnlíkamettum ritum við tveimum ára millumbili.

# UMSÓKNIR UM GRANSKINGARSTUÐUL Í 2022

Ein fittur partur av almennu játtanini til Fróðskaparsetrið fer til granskingartíð hjá starvsfólkum okkara, ið framleiða gransking á høgum altjóða stigi. Tó er tað av alstórum týdningi, at granskarar eisini nýta ein part av granskingartíðini til at søkja um stuðul til gransking frá almennum og privatum grunnum, bæði í Føroyum og uttanlands, tí gransking kostar.

Føroyskir granskarar hava møguleika at søkja um stuðul til gransking í Føroyum og uttanlands. Í Føroyum er tað Granskingargrunnurin undir Granskingarráðnum, ið veitir størsta almenna stuðulin til gransking.

Í 2022 vórðu tilsamans 57 umsóknir um granskingarstuðul sendar frá Setrinum til ymiskar grunnar í Føroyum og uttanlands. Talið av umsóknum, har starvsfólk á Setrinum eru nevndir umsøkjarar á umsóknum um stuðul til gransking, er vaksið samanborið við bæði 2020 og 2021, tá ávíkavist 55 og 40 umsóknir vórðu sendar frá Setrinum – tvs. ein vøkstur á 43 prosent frá 2021 til 2022, sí mynd 13. Eins og undanfarin ár verða flestar umsóknir um stuðul til gransking sendar til Granskingargrunnin undir Granskingarráðnum, og nógvar umsóknir verða eisini sendar til Betri Stuðul. Samanborið við undanfarin ár er talið á umsóknum, har granskarar eru við á umsóknum til NordForsk, vaksið munandi, tí í 2022 vóru granskarar á Setrinum við á 12 umsóknum til NordForsk.

Talið á játtaðum umsóknum í 2022 er fallið nakað samanborið við undanfarin ár – úr 65 prosentum í 2020, sum var serstakt vegna fígging til koronuverkætlanir, niður í 38 prosent í 2021 og 21 prosent í 2022, sí mynd 13. Tó skal havast í huga, at samlaða játtaða upphæddin í 2022 ikki er fallin samanborið við undanfarin ár, hóast talið á játtaðum umsóknum er nakað minni.

Mynd 14 vísir, at tað í 2022 vórðu sendar flest umsóknir frá DHS, NVD og SSD, og at NVD fekk flestar av sínum umsóknum játtaðar, nevniliga 42 prosent. Myndin er ein góð spegling av teimum møguleikum, ið eru á ymisku granskingarøkjunum at søkja um stuðul, og er samstundis eisini ein áminning um, at ávís øki á Setrinum eru undir menning, meðan onnur øki krevja serligan ans, skulu vit varðveita og menna nøkur av hesum økjum, sum m.a.

MYND 13: **TALIÐ AV UMSÓKNUM UM GRANSKINGARSTUÐUL/ÁR**




Myndin vísir talið á sendum (bláir stabbar) og játtaðum (appelsinlittir stabbar) umsóknum um granskingarstuðul frá Fróðskaparsetrinum í 2020, 2021 og 2022.

MYND 14: **TALIÐ AV UMSÓKNUM UM GRANSKINGARSTUÐUL Í 2022**




Myndin vísir talið á sendum (bláir stabbar) og játtaðum (appelsinlittir stabbar) umsóknum um granskingarstuðul á teimum fimm deildunum á Fróðskaparsetrinum í 2022.

MYND 15: **STARVSFÓLK VIÐ GRANSKINGARSKYLDU, IÐ ERU NEVNDIR UMSØKJARAR Í UMSÓKNUM UM GRANSKINGARSTUÐUL Í 2021/2022**




Myndin vísir prosent-partin av akademiskum starvsfólkum við granskingarskyldu á teimum fimm deildunum á Setrinum, ið hava sent umsókn um granskingarstuðul í 2021 og/ella 2022. Reyða strikan vísir málið hjá Setrinum, ið er, at 60 prosent av akademisku starvsfólkunum við granskingarskyldu við hægst tveimum ára millumbili eru nevnd sum umsøkjarar í dygdargóðum umsóknum um uttanhýsis fígging av granskingarverkætlanum.

eru avgerandi fyri viðlíkahald og menning av bæði máli og mentan framyvir.

Í Mál og mið 2020-2024 fyri Fróðskaparsetur Føroya er ein av raðfestingunum í mun til gransking og framtak, at: "*60 prosent av okkara akademisku starvsfólkum við hægst tveimum ára millumbilum eru nevndir umsøkjarar í dygdargóðum umsóknum um uttanhýsis fígging av granskingarverkætlanum*."

Mynd 15 vísir, hvussu stórur partur av akademisku starvsfólkunum við granskingarskyldu við hægst tveimum ára millumbilum hava verið nevndir umsøkjarar á umsóknum um uttanhýsis fígging av granskingarverkætlanum. Tølini fyri 2021 og 2022 vísa, at Setrið ikki røkkur ásetta málinum enn, tí í 2021 og 2022 hava 56 prosent av starvsfólkunum við granskingarskyldu verið við á umsóknum um uttanhýsis fígging. Hetta er tó ein framgongd samanborið við tíðarskeiðið 2020 og 2021, tá einans 47 prosent av starvsfólkunum við granskingarskyldu vóru við á umsóknum um uttanhýsis fígging. Harafturat vísa tølini á mynd 16, at tað bert eru tvær deildir á Setrinum, ið røkka málinum, meðan framgongd sæst á hinum deildunum.

Samanumtikið veksur talið av umsóknum støðugt, tó at talið av játtaðum umsóknum í 2022 tykist at minka samanborið við 2020 og 2021. Ein av orsøkunum er ivaleyst, at kappingin um fíggjarligan stuðul til gransking í Føroyum er vaksin munandi seinnu árini – tó uttan at almenni stuðulin til gransking er vaksin seinastu mongu árini. Tí er eisini neyðugt at ásanna, at skal granskingin á Setrinum vaksa og verða við til at menna føroyska samfelagið er alneyðugt, at føroyskir granskarar í enn størri mun enn áður eisini senda umsóknir um stuðul til gransking til grunnar uttanlands, umframt at stuðulin til gransking frá almennari, kommunalari og privatari síðu má vaksa.

# PH.D.-LESANDI Á SETRINUM

Fyri at menna og varðveita eitt burðardygt granskingarumhvørvi á Setrinum og í føroyska samfelagnum yvirhøvur er umráðandi støðugt at seta við og útbúgva ph.d.-lesandi.

Seinastu árini hevur talið av ph.d.-lesandi á Fróðskaparsetrinum verið støðugt: 19 í 2020, 18 í 2021 og 21 í 2022. Eins og undanfarin ár eru flest ph.d.-lesandi knýtt at DHS, meðan fimtihvør ph.d.-lesandi er heimahoyrandi á annaðhvørt NVD ella SSD, sí mynd 16.

Miðalaldurin á teimum ph.d.-lesandi á Setrinum var í 2022 beint yvir 40 ár.

Av teimum 20, sum í 2022 vóru innskrivað sum ph.d.-

MYND 16: **PH.D.-LESANDI Á SETRINUM**




Myndin vísir talið á ph.d.-lesandi á teimum fimm deildunum á Setrinum í 2020 (bláir stabbar), í 2021 (appelsinlittir stabbar) og í 2022 (gráir stabbar).

lesandi á Setrinum, vóru 11 kvinnur og 10 menn. Eins og undanfarin ár var kynsbýtið rímiliga javnt á DHS, NVD og SSD, meðan tað í 2022 bert vóru kvinnulig ph.d.-lesandi á FMD og NÁD, sí mynd 17.

Í 2022 vórðu tríggir nýggir ph.d.-arar klaktir á Setrinum – ein maður og tvær kvinnur í ávikavist heilsuvísindum, orkufrøði og vindorkufrøði.

Evnini, ið ph.d.-lesandi á Fróðskaparsetrinum granska í, fevna sera breitt. Tó hava tey øll tað til felags, at tey eru við til at menna bæði gransking og undirvísing á Setrinum, eins og tey hava ávirkan á føroyska samfelagið í síni heild.

Hetta sæst væl aftur í almenna orðaskiftinum, har boð tíðum eru eftir ph.d.-lesandi um at úttala seg ella at leggja fram nýggjastu granskingarúrslit síni.

Fleiri av teimum ph.d.-lesandi vistast í styttri ella longri tíðarskeið í øðrum granskingarumhvørvi, og flestu ph.d.-verkætlanirnar eru í samstarvi við onnur universitet, stovnar og fyritøkur – bæði í Føroyum og/ella uttanlands. Nevnast kunnu millum annað Københavns Universitet, Danmarks Tekniske Universitet, Roskilde Universitet, Fiskaaling, Fótbóltssamband Føroya, SEV og Heilsugranskingareindina í Sjúkrahúsverkinum.

MYND 17: **KYNSBÝTIÐ MILLUM PH.D.-LESANDI/DEILD 2022**




Myndin vísir kynsbýtið millum kvinnur (bláir stabbar) og menn (appelsinlittir stabbar), umframt samlaða talið á ph.d.-lesandi (gráir stabbar) á teimum fimm deildunum á Setrinum í 2022.

# PH.D.-LESTUR Á SETRINUM

Seinastu tvey árini er miðvíst arbeiði farið fram á Setrinum fyri at tryggja øllum ph.d.-lesandi á Fróðskaparsetrinum eina skynsama og smidliga gongd gjøgnum ph.d.-lesnaðin, ið lýkur øll krøv og ásetingar í ph.d.-kunngerðini.

Ph.d.-ráðið og ph.d.-netverkið á Fróðskaparsetri Føroya, ið hava sum fremstu uppgávu at fáa betri skipaðar karmar um tey ph.d.-lesandi, hava havt avgerandi leiklut í hesum arbeiðinum.

Sambært kravi í ph.d.-kunngerðini skulu øll ph.d.-lesandi taka ph.d.-skeið á altjóða stigi, sum svara til 30 ECTS-stig. Í 2022 varð skipað fyri trimum ph.d.-skeiðum á Setrinum, sum øll vóru fullsett við bæði ph.d.-lesandi og granskarum frá Setrinum, umframt frá øðrum norðurlendskum universitetum og føroyskum granskingarstovnum.

Eftirmetingarnar frá skeiðunum vísa, at umframt at stimbra einstaka granskaran fakliga, eru ph.d.-skeiðini við til at samansjóða føroyska granskingargeiran og byggja brýr millum ymisku granskingarstovnanar.



MYND 18: Myndin er frá ph.d.-skeiði í Akademiskari skriving á enskum fyri granskarar. Hetta er eitt afturvendandi skeið, ið Granskingar- og framtakseindin skipar fyri.

Í 2022 var trivnaðarkanning gjørd millum øll ph.d.-lesandi á Setrinum. Úrslitini vístu, at ábót krevst á onkrum økjum. Millum annað er tørvur á at førleikamenna vegleiðarar á Setrinum, og at betra um innleiðsluna fyri tey ph.d.-lesandi. Eisini sæst, at mannagongdir fyri ph.d.-lestur á Fróðskaparsetrinum frá byrjan til enda vanta.

Í november 2022 varð tí í samstarvi við Syddansk Universitet skipað fyri ph.d.-vegleiðara-skeiði fyri øllum professarum, lektarum og adjunktum á Fróðskaparsetri Føroya. Undirtøkan var framúr góð, og eftirmetingarnar vístu, at skeiðið hevði givið flest øllum okkurt jaligt íkast, sum tey kunnu nýta í sambandi við ph.d. vegleiðingum teirra.

Tá ið ræður um at bøta um bæði innleiðslu av ph.d.-lesandi og mannagongdir í sambandi við ph.d.-lesnað, hevur Setrið sett sær sum mál at seta á stovn ein ph.d.-skúla í 2023.

## PH.D.-SKÚLI Á SETRINUM

Í tíðarskeiðnum frá september 2021 til oktober 2022 varð Fróðskaparsetur Føroya eftirmett av altjóða uttanhýsis metingarnevnd.

Niðurstøðan hjá metingarnevndini hevði tilsamans 20 tilmæli, og eitt teirra var, at: "*Setrið eigur at gera enn meira fyri at fáa sett ein ph.d.-skúla á stovn. Hetta fer at stimbra enn meira undir greiða stavnhaldið, sum longu er, um eitt "savnað" Fróðskaparsetur Føroya, sum ikki er avmarkað av deildarmørkum.*"

Arbeiðið við at gera eitt regluverk fyri at fáa sett ein ph.d.-skúla á stovn er farið í gongd, og Fróðskaparsetrið miðar eftir at hava eitt uppskot klárt á heysti í 2023.

# SAMANUMTØKA

Granskingarvirksemið á Fróðskaparsetrinum er í støðugari menning, og hetta sæst beinleiðis aftur í talinum á vísindaligum útgávum, umsóknum, akademiskum starvsfólkum og ph.d.-lesandi.

Fremsta uppgávan hjá Setrinum er at veita dygdargóðar útbúgvingar og at framleiða dygdargóða gransking, sum er viðkomandi fyri samfelagsliga, búskaparliga, mentanarliga, løgfrøðiliga og umhvørvisliga tørvin í Føroyum.

Seinastu árini eru fleiri nýggjar útbúgvingar settar á stovn á Setrinum, eins og upptøkan til ávísar útbúgvingar er ella verður økt komandi árið. Setan av námslektarum og granskarum og serliga undirvísing av lesandi fyllir tí nógv í gerandisdegnum - hetta fyri at Setrið altíð kann veita granskingargrundaða og góðskutryggjaða undirvísing á altjóða stigi.

Tó eigur talið á granskarum á Setrinum at økjast, serliga í heilsu-, undirvísingar- og námsvísindum, og arbeiðsbýtið fyri starvsfólk, sum undirvísa og granska, skal í enn størri mun enn nú skilmarkast, soleiðis sum altjóða uttanhýsis metingarnevndin eisini mælir til. Harumframt er tað gleðiligt, at núverandi landsstýrið sigur seg vilja stuðla undir gongdina at økja um gransking í Føroyum. Sum m.a. sagt verður í samgonguskjalinum fyri 2023: "*Vit vilja skapa betri útbúgvingarmøguleikar, økta gransking og lyfta mentan, list og mál á øllum økjum.*"

Skipan og menning av ph.d. útbúgvingum og ph.d. økinum sum heild á Setrinum hevur seinastu árini havt hægri raðfesting, og gongst sum ætlað, verður ph.d.-skúli settur á stovn á Fróðskaparsetrinum í 2023. Umframt at tryggja betri góðsku og treytir fyri tey ph.d.-lesandi, fer hetta vónandi eisini at økja um talið av ph.d.-lesandi, ið verða innskrivað til ph.d.-útbúgving á Setrinum.

Á javnstøðuøkinum er Setrið væl á veg, og tølini fyri 2022 vísa, at javnstøða er millum kyn í akademiska starvsfólkahópinum. Eins og í grannalondunum vísa tølini tíverri, at menn í størri mun enn kvinnur hava ovastu sessirnar í erva á akademiska stiganum, og tí eru tað bara beint undir 40 prosent av starvsfólkunum við granskingarskyldu og granskingartíð, sum eru kvinnur. Harumframt eru menn eisini yvirumboðaðir í leiðslusessunum á Setrinum, og tískil eiga vit framvegis at arbeiða við tilmælinum frá uttanhýsis metingarnevndini um at gera eina inklusiónsætlan, ið fevnir um javnstøðu millum kynini.

Núverandi landsstýrið leggur í samgonguskjalinum upp til, at ein langtíðarætlan skal leggjast fyri gransking, menning og nýskapan, og arbeiðið at menna eina yvirskipaða granskingarstrategi fer í næstum eisini í gongd á Setrinum. Tó er alneyðugt, at ein tílík strategi í høvuðsheitum er í samsvari við nationalar ætlanir á granskingarøkinum, og at samstarvið við aðrar granskingarstovnar og privatar fyritøkur mennist og økist.

Tilmælini og ynskini fyri gransking, menning og nýskapan eru mong, eins og mong dugnalig fólk eru til at lyfta uppgávuna – bæði á og uttan fyri Setrið. Tó er tað ein sannroynd, at um Setrið og næsta ættarlið av granskarum skal mennast í enn størri mun enn nú, er neyðugt, at almenni stuðulin til gransking veksur so líðandi og samsvarandi broytandi tíðunum.

